## ES-góðskukrøv óhóskandi



Tær strongu góðskureglurnar hjá ES gera, at grønlendskar vørur hava ongan møguleika á heimamarknaðinum. Nú krevja fleiri, at grønlendsku myndugleikarnir gera sínar egnu reglur og seta ES-reglurnar til viks, tí tær eru óhóskandi í Grønlandi. Millum teirra, sum krevja lagaligari reglur, er felagið hjá bygdunum. Formaðurin, Jens Kristian Therkelsen, sigur við KNR, at tær strongdu ES-reglurnar forða fyri, at fólk á bygd kunnu dúva upp á matvøruframleiðslu. Jens Kristian Therkelsen leggur tó afturat, at tað samstundis er umráðandi er betra førleikan hjá bygdafólkinum bæði innan sjálva framleiðsluna og virkisrakstur.

## FSN umborð á Tjaldrinum

Á heimasíðuni hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag (FSN) eru fleiri myndir, sum tiknar eru umborð á vaktar-og bjargingarskipinum Tjaldrinum. Felagið hjá navigatørum hevur vitjað umborð og hevur verið ymsastaðni kring um skipið, heilt av brúnni og niður í maskinrúmið. Myndir eru av manningini, sum situr til borðs, og myndir eru eisini av vitjan í maskinrúminum og aðrastaðni umborð. Tey, ið kundu hugsað sær at sæð hesar myndir, kunnu fara inn á heimasíðuna hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag www.fsn.fo

# Eykaaðalfundur á Kósini í dag

**Hanus Hansen sigur, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur verið á virkinum og hevur sett nøkur krøv um, hvat skal gerast, áðrenn virkið kann lata upp aftur, men hann væntar, at fólk sleppa aftur til arbeiðis á Kósini um einar tvær til tríggjar vikur**



*Tað tekur ofta longri tíð, enn roknað verður við, men gongst, sum Hanus Hansen, stjóri, nú væntar, sleppa fólk aftur til arbeiðis á Kósini í Klaksvík um eina ella tvær vikur*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag klokkan 15 skuldi eykaaðalfundur verða í P/F Kósini í Klaksvík. Tá verður nýggj nevnd vald, men hetta verður ikki tann endaliga nevndin, sum kemur at eiga og reka flakavirkið á Kósini í framtíðini.

Hanus Hansen, sum er høvuðsmaðurin aftanfyri keypið av stóra flakavirkinum í Klaksvík, sigur, at nevndin, sum kemur at umboða nýggju eigararnar og kemur at reka virkið fram eftir, helst verður vald um ein ella tveir dagar.

- Alt gongur sum ætlað við at fáa viðurskiftini rundan um keypið upp á pláss, men enn eru nøkur praktisk viðurskifti eftir, áðrenn vit kunnu siga ítøkiliga, hvussu nýggi eigaraviðurskiftini verða skipað, sigur hann.

### Nøkur krøv

Hanus Hansen sigur, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur verið á virkinum og hevur sett nøkur krøv um, hvat skal gerast, áðrenn virkið kann lata upp aftur.

- Talan er um nøkur ting, sum skulu gerast, men talan er ikki um tær heilt stóru ábøturnar.

Hann vil tó ikki seta nakað krónutal á, hvat kravdu ábøturnar koma at kosta.

Nevnt hevur annars verið, at tá eitt felag, sum eigur eitt slíkt flakavirkið, ikki fer undir hamaran, men verður selt og heldur fram, sleppur felagið undan, at alt virksemið kemur undir "luppin" hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum um hetta var ein nýggj verkætlan.

Hanus Hansen væntar tó ikki, at tað fer at taka so langa tíð at fremja tær ábøtur, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan krevur.

### Eftir ætlan

- Alt gongur, sum tað skal, og nú bíða vit eftir, at tey seinastu tingini koma upp á pláss, sigur Hanus Hansen.

Tað er nú umleið eitt ár síðan, at stóra flakavirkið í Klaksvík læt aftur, men gongst, sum nýggju eigararnir ætlað, gongur ikki long tíð aftrat, áðrenn fólk sleppa til arbeiðis aftur á Kósini í Klaksvík.

**Jólaborðhald við dansi**

**Í Eydnuni á Oyrarbakka**
**28. november og 5. desember**

Komið og hugni tykkum í Eydnuni saman við fyritøkuni, bindiklubbanum ella sum einstaklingar.

**Fyri 500 kr. fyri hvønn fáa tit:**

- Gott undirhald frá sjónleikarabólkinum
- Lekra buffet við heitum og køldum rættum frá Smyrjibreyðsbúðini
- Góðan dans 28. nov v/ Jákup Marner Anthoniusen 5. des v/ ROK – Signar í Homrum

Tilmelding á tlf. 72 23 22 ella við at skriva til eydnana@gmail.com til og við mánadagin 2. nov

**Vit síggjast í Eydnuni**

# Áhugaverd tøl úr høvuðsvinnu

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein fyrispurningur hjá løgtingsmanni Sjálvsstýrisfloksins, Kára P. Højgaard, til landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur fingið nøkur áhugaverd tøl undan kavi.

Í svarinum hjá Jacobi Vestergaard, sum byggir á tøl hjá Hagstovu Føroya, kemur fram, at talið av føroyskum fiskimonnum við føroyskum fiskiskipum árini 2003 til og við 2008 er minkað við 913 fólkum, og í fiskavirkisvinnuni á landi er talið av arbeiðsfólki minkað við 768 fólkum.

Hetta merkir, at samlaða talið av føroyskum fiskimonnum við føroyskum fiskiskipum og talið av arbeiðsfólki á flakavirkjunum kring landið er minkað við umleið einum triðingi í seks ár.

Fólk, sum starvast innan ali-og kryvjivinnuna eru ikki við í hesum tølum.

### Útlendsk arbeiðsmegi

Eini 5-10% av fiskimonnunum, sum sigla við føroyskum fiskiskipum á nærog fjarleiðum, eru útlendingar. Taka vit fiskaarbeiði á landi, telja útlendingar eini 10% av samlaðu arbeiðsmegini.

Hetta upplýsti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, tá hann svaraði fyrispurningi hjá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni.

Sambært Hagstovu Føroya og Útlendingastovuni eru eingi nágreinilig tøl tøk, sum siga, hvussu nógvir útlendingar hava starvast í ávísum vinnugreinum í ávís tíðarskeið.

- Men Reiðarafelagið og Fiskimannafelagið meta, at talið av útlendingum umborð á fiskiskipum á nærleiðum neyvan er hægri enn 5% av samaða talinum – og verða skip á fjarleiðum íroknað, liggur talað helst millum 5 og 10%.

Sambært Jacobi Vestergaard hevur Ráfiskakeyparafelagið leysliga mett, at útlendingar telja umleið 10% av samlaðu arbeiðsmegini á føroyskum fiskavirkjum.